Kommunufelagið

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting
5. februar 2024

Okkara j.nr.
24/00608-4

Málsviðgeri
JH

Tygara j.nr.
24/01720

**Ummæli av uppskoti um broyting av fólkaskúlalógini**

Kommunufelagið fekk 19. januar 2024 *uppskot um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan (Ásetingar um næmingatal í hvørjum flokki)* til ummælis. Felagið viðgjørdi uppskotið á borgarstjórafundi 26. januar 2024 og hevur hesar viðmerkingar.

**Felagið átalar framferðarháttin**

Uppskotið varð sent felagnum til ummælis seinnapartin fríggjadagin 19. januar við freist at koma við ummæli á middegi mánadagin 5. februar. Undan hesum hevði felagið – á reint umsitingarligum stigi – verið umboðað í arbeiðsbólki, sum í mai 2023 læt lands- og kommunalpolitisku skipanini tilmæli um ymsar tættir innan fólkaskúlan. Harundir var eitt tilmæli um at hyggja nærri at floksstøddum. Eitt uppskot, sum kommunurnar av givnum orsøkum hava sín serstaka og týðandi áhuga í.

Síðani fráboðaði landsstýrið í røðu løgmans á ólavsøku, at aðalorðaskifti skuldi vera um fólkaskúlan í heyst. Hetta orðaskiftið fræustist ikki meira um, og felagið hevur ikki havt nakað samskifti við landsstýrið um eina tillaging av floksstøddini – hvørki á umsitingarligum ella politiskum stigi.

Næsta stig hjá landsstýrinum var at senda eitt uppskot í almenna hoyring; enntá við styttari freist. Hetta kann felagið ikki góðtaka. Eitt uppskot sum hetta eigur ikki at fara í almenna hoyring uttan at kommunurnar – millum aðrar áhugapartar – eru tiknar við í tilgongdina frá byrjan.

Hetta landsstýrið hevur annars verið millum tey frægu at halda eitt samskifti við kommunurnar og hevur eisini sett fólk burturav til hetta. Fyri hetta hevur landsstýrið avgjørt rós uppiborið. Men í hesum føri er fari so mikið illa fram, at felagið má átala framferðarháttin og heita á landsstýrið um at leggja á annan bógv frameftir.

Ítøkiliga mæla vit til, at lógararbeiði, sum má metast at fáa týðandi ávirkan á kommunal viðurskifti, fer fram í tøttum samskifti millum land og kommunur – allarhelst heilt frá hugskoti til almenna hoyring. Landsstýrið hevur longu ein orðaðan leist fyri slík arbeiði, og tað snýr seg tí bert um at seta leistin í verk. Varð hesin leistur nýttur, so var gjørligt at taka hædd fyri

mongum av teimum viðmerkingum og atfinningum, sum felagið niðanfyri vísir á, og sum eftir okkara tykki hóska seg betur at viðgera í einari verkætlanartilgongd enn í einari almennari hoyring.

Viðmerkingarnar hjá felagnum eru hesar:

**Ikki tørvur á lógarbroyting**

Felagið ivast stórliga í, um tað í heila tikið er tørvur á at broyta fólkaskúlalógina fyri at røkka einum politiskum máli um, at fleiri vaksin skulu vera um skúlabørnini. Sannlíkt kann sama endamál røkkast við at tillaga landsins játtanarskipan til fólkaskúlan. Landið kann sostatt velja at raðfesta, at tað til dømis skal vera játtan til ein lærara fyri hvørjar 20 næmingar í skúlanum. Talan er jú um eina *rakstrarjáttan* og ikki eina *lógarbundna játtan*. Um ikki játtan er á landsins fíggjarlóg til ein lærara fyri hvørjar 20 næmingar í skúlanum, ja er í grundini líkamikið, hvat stendur í fólkaskúlalógini.

Mælt verður til, at landsstýrið kannar hendan møguleikan nærri og hareftir metir um, hvørt tað er tørvur á uppskotinum fyri at røkka tí endamáli, sum landsstýrið hevur við uppskotinum.

**Ósamsvar millum lógartekst og endamál**

Lógarteksturin, sum landsstýrið skjýtur upp, er ikki í samsvari við tað endamál, sum uppskotið sambært viðmerkingunum hevur. Ætlanin er sambært viðmerkingunum at innføra nýggja markið á 20 næmingar yvir 9 ár, meðan lógarteksturin illa kann skiljast á annan hátt, enn at nýggja markið verður innført alt fyri eitt; fyri allar flokkar; og í øllum árgangum.

Áðrenn uppskotið verður lagt fyri tingið, eigur tað at verða tryggjað, at samsvar er millum endamál og lógartekst.

**Kann gera meiri skaða enn gagn**

Hetta uppskot kann føra til, at flokkar á t.d. 21 næmingar verða býttir upp í 10 og 11. Tað er púra onki grundarlag í granskingini fyri at halda, at hetta er eitt gott hugskot. Heldur eru greiðar ábendingar um, at tað er jaligt fyri flokkin og trivnaðin hjá tí einstaka, at floksstøddin kemur upp um eitt vist.

Sannlíkt er tað tí eitt verri hugskot at býta ein flokk á 24 upp í tveir á 12, enn tað er at seta inn við øktum lærarakreftum. Av tí sama gevur tað lítla meining at geva skúlaleiðslum heimild at býta smáar flokkar upp í enn smærri eindir. Uppskotið skapar sostatt ein vansa fyri, at

skúlaleiðslan fær heimild at gera nakað, sum vit vita sannlíkt er meira skaðiligt enn at lata vera.

Av somu orsøk mæla vit til, at markið á 24-26 verður varðveitt sum útgangsstøði. Tað eigur ikki at vera loyvt skúlaleiðslum at býta flokkar sundur, sum eru minni enn hetta – uttan so at heilt serligar orsakir væl at merkja tala fyri hesum.

**Stórir árgangir fara at skeikla raðfestingina**

Síðan 2014 er talið av børnum undir skúlaaldur økt við 750 børnum, svarandi til 15 %. Hetta hevur havt við sær, at kommunurnar hava verið noyddar at fremja munandi útbyggingar á dagstovnaøkinum. Talið av børnum í skúlaaldri er einans vaksið við 120 børnum í sama tíðarskeiði, svarandi til 2 %. Men hatta fer nú at broytast, og stóri fólkavøksturin fer nú av álvara at vísa seg í fólkaskúlanum komandi árini.

Uppskotið tekur als ikki hædd fyri, at hesir stóru árgangirnir eru á veg inn í skúlarnar, og at hesir eftir uppskotinum so ella so vera stýrandi fyri komandi skúlabygging. Hetta er ikki skynsamt og heldur ikki í samsvari við tær metingar, sum kommunurnar gera sær, tá ið nýggir skúlar verða projekteraðir.

Tað ber ikki til at hyggja eftir einum ella fáum árgangum, tá ið skúlabygging umræður. Hetta eigur at byggja á eina størri nágreining av staðbundna tørvinum. Uppskotið eigur at fyrihalda seg til hesi týðandi viðurskiftini, áðrenn løgtingið verður biðið um at taka støðu til málið.

**Skúlar verða ikki bygdir á hvørjum ári**

Flestu kommunur hava bert ein skúla (ella ein høvuðs-/meginskúla). Nýtslutíðin hjá skúlanum er væl longri enn 9 ár, og tað sama er áramálið, sum kommunurnar í flestu førum royna at raðfesta byggingina eftir.

Uppskotið sýnist ikki taka hædd fyri hesum, men heldur byggja á eina skeiklaða fortreyt um, at slíkt infrakervi kann tillagast í einari handavending. Ein slík fortreyt er ikki í samsvari við veruleikan, og tað kann hava ógvuliga óhepnar avleiðingar, um lýsingin av hesum viðurskiftum ikki verður gjørd neyvari fyri løgtinginum.

**Tørvurin er nøktaður yvir tíð**

Nógvar kommunur hava seinastu árini gjørt ovurstórar íløgur í skúlabygging. Okkara meting er, at hølistørvurin á skúlaøkinum – yvir tíð og við fyrivarni fyri heilt stóru

útstykkingarætlanunum – er nøktaður á flestu plássum. Tað er undranarvert, at uppskotið als ikki nemur við hesi viðurskifti.

Tað er somuleiðis undranarvert, at landsstýrið ongar framrokning hevur gjørt av, hvørjar avleiðingar hetta uppskotið fer at hava fyri hølistørvin í skúlunum. Mann tekur einans støði í tølum um, hvør avleiðingin er, um man innførir broytingina *alt fyri eitt* – men tað er jú ikki *tað*, sum er endamálið við uppskotinum. Tað, sum vit vita er, at setti man floksstøddina niður á 20 næmingar í dag, so fáa heili átta fólkaskúlar millum 5 og 10 flokkar afturat. Av hesum koma Skúlin á Fløtum, á Skúlatrøð, á Argjahamri, Sankta Frans, og Tofta skúli at mangla eitt heilt ella útvið eitt heilt spor.

Hetta eru álvarsamar ábendingar um, at uppskotið hevur heilt munandi avleiðingar – eisini fyri tær kommunur, sum nýliga hava gjørt ovurstórar íløgur á skúlaøkinum. Men tað verða ikki annað enn ábendingar, tá ið ongar veruligar framrokningar eru gjørdar í mun til tað endamál, sum uppskotið hevur. Og tað kann ikki sigast annað enn at vera stak óheppið – serliga tá ið hugsað verður um, at hesar framrokningar á ongan hátt eru truplar at gera.

## Skúlastjórin kann ikki krevja skúlabygging

Uppskotið gevur skúlastjóranum heimild til – ár undan ári – at gera av, um flokkar yvir 20 næmingar verða býttir upp ella ikki.

Givið er, at hetta ber ikki til, um ein avleiðing gerst krav um bygging av nýggjum hølum, so hvørt sum leiðslan á skúlanum metir tað hóskandi. Kommunurnar hava stóra virðing fyri skúlaleiðslunum kring landið, men kommunurnar kunnu als ikki liva við, at einstøk starvsfólk hjá landinum kunnu gera av, nær raðfestingar fyri hundraðtals milliónir krónur verða gjørdar í kommunala geiranum. Havast skal eisini í huga, at saman við einari og hvørjari íløgu á skúlaøkinum liggur ein tilknýtt rakstrarútreiðsla, sum krevur raðfesting ár undan ári. Tann uppgávan og heimildin at raðfesta og leggja til rættis liggur hjá kommunustýrunum kring landið.

Uppskotið eigur at gera púra greitt, at skúlabygging framhaldandi er ein kommunalpolitisk raðfesting – sjálvsagt innanfyri nakrar yvirskipaðar landspolitiskar karmar, so leingi skúlaøkið er býtt millum land og kommunur.

## Skúlaøkið hevur ikki størsta tørvin

Alt bendir á, at kommunurnar komandi nógvu árini skulu leggja størsta partin av íløguorku síni í eldraøkið og kommunalu heilsutænasturnar.

Uppskotið kann bera í sær, at kommunurnar mugu flyta íløgur sínar frá einum eldraøki við stórum og aktuellum tørvi til eitt skúlaøki við avmarkaðum framtíðartørvi.

Uppskotið eigur heldur at gera greitt, at skúlabygging eigur at vera partur av vanligu kommunalu raðfestingunum – og serliga á lógarbundnum økjum so sum eldraøkinum.

Vegna
Kommunufelagið

Torbjørn Jacobsen
formaður

Eyðun Christiansen
stjóri